# Noreg økir útflutningin til Brasiliu

Í Noregi siga framleiðarar, at stórur áhugi er fyri klippfiski, og norðmenn vænta sær nógv góð ár framyvir

Norski útflutningurin av klippfiski til Brasiliu vaks við 30% í 2006.

Tað veit NRK at siga.

Hetta hendir samstundis, sum prísirnir á klippfiski úr toski eru øktir við 40% í Sao Paulo-økinum.

Men brasilianarar eta ikki so nógvan klippfisk í part, sum eitt nú fólk í Portugál gera.

180 miljónir brasilianarar eta nevniliga bert 200 gram av klippfiski í part um árið, meðan hvør íbúgvi í Portugál í miðal etur 7,5 kilo.

Í Noregi siga framleiðarar, at stórur áhugi er fyri klippfiski, og norðmenn vænta sær nógv góð ár framyvir. **(-vilmund)**



*Brasilia keypir størri og størri nøgdir av saltfiski úr Noregi*

# . C. Joensen á Oyri



*Rækjuvirkið á Oyri byrjaði at keypa rækjur í 1986, og fyri einum ári síðan helt framleiðslan uppat. Soleiðis virkaðu tey rækjur til útflutnings á Oyri í tilsamans 20 ár – í hesum umfari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

skeljaveiði. Flaggskipari var eingin annar enn Júst í Túni. Eg minnist, at vit løgdu at á Toftagjógv eftir honum. Tá ið vit bóðu hann koma við, helt Júst fyri, at hann hevði roynt so mangt undarligt í lívinum, at hann tað sama kundi royna hetta eisini.

Sum frá leið fóru fleiri skip á skeljaveiði og løgdu veiðina upp á Oyri.

Sjálvur sigldi Edmund av og á í eini 10-12 ár tilsamans, og hesi árini var hann umborð á fleiri ymiskum skipum, ofta sum motorpassari.

– Eg vil siga, at í fyritøkuni O. C. Joensen havi eg tey flestu árini meira verið tann praktiski handilsmaðurin, sum hann tekur til.

Men Edmund hevur eisini fingist við aling í nógv ár, bæði saman við Júst í Túni, Andriasi Reinert og Jákupi Sverra Joensen.

## Stovnaðu partafelag

Í umleið 1980 varð firmaið O. C. Joensen gjørt um til partafelag, og tá bygdi felagið eisini nýtt skeljavirki og keypti hekkutrolaran Norðheim til hesa veiði.

– Tað var ein stórur fyrimunur at fáa Norðheim, sum tekur 55 tons hvønn túrin og kann – um fiskiskapurin er góður – landa einaferð um døgnið. Skipið hevur eisini skiljimaskinu, og hóast skipanin við dregginum alla tíðina hevur verið hin sama, er dreggið nógv størri í dag, enn tá ið vit byrjaðu í sínari tíð.

Edmund sigur, at skeljavirkið virkar eini 4.000 av skeljum um árið.

– Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu skelin roynist til fiti og dygdar, men vit plaga at siga, at eini 10% av veiðini er kjøt, sigur hann.

## Rækjuvirksemi

Rækjuvirkið á Oyri byrjaði at keypa rækjur í 1986, og fyri einum ári síðan helt framleiðslan uppat. Soleiðis virkaðu tey rækjur til útflutnings á Oyri í tilsamans 20 ár – í hesum umfari.

Tá ið meginparturin av føroyska rækjuskipaflotanum fór av knóranum, gjørdist einki hjá rækjuvirkinum á Oyri, tí skulu rækjur úr eitt nú Grønlandi og Kanada arbeiðast á virkinum, skal verjutollur rindast til ES, tá ið lidna vøran verður seld.

– Marginalarnir í hesi vinnu eru so mikið smáir, at slík vinna verður ikki lønandi undir verandi umstøðum, sigur Edmund.

Hann heldur tað vera harmiligt, at rækjuvirksemið á Oyri skuldi halda uppat, samstundis sum hópur av rækjum verða veiddar í eitt nú Grønlandi og Kanada.

– Tað hava ongantíð verið fiskaðar so nógvar rækjur í Norðuratlantshavi sum í løtuni, og ongantíð hava fleiri pilkaðar rækjur verið seldar. Kortini ber ikki til við teimum tollviðurskiftum, vit hava, at skapa lønandi vinnu her heima, sigur hann.

Edmund Joensen vísir á, at tá ið vit selja uppruna fiskaðar so nógvar rækjur, t.v.s. rækjur, sum verða veiddar undir føroyskum flaggi, kunnu hesar seljast tollfrítt til ES. Haraftrat kemur, at vit við kummuleringsavtaluni eisini kunnu keypa, virka og selja íslendskar og norskar rækjur sum føroyskar.

– Men tað er í Grønlandi og Kanada, at tær stóru nøgdirnar verða veiddar, og har sleppa vit ikki undan tollinum, leggur hann aftrat.

# Tey ungu »svíkja« fiskin



*Tað eru serliga tey ungu, sum dáma betur kjøt enn fisk*

Kjøtnýtslan hevur ongantíð verið størri, enn hon er í dag, og tað eru serliga tey ungu, sum ikki leggja so nógv í at fáa fisk at eta

Annechen Bugge, sum starvast innan brúkaragransking í Noregi, sigur við norskar fjølmiðlar, at nýtslan av kjøti hevur ongantíð verið størri enn nú. Samstundis hevur eisini verið stórur vøkstur í nýtsluni av "hvítum" kjøti, sum vit kunnu hugsa okkum er høsnarungi og annar slíkur fenaður.

Hon sigur, at fiskur við nøkrum fáum undantøkum er við at missa fótafestið á marknaðinum.

– Tað er ikki so einfalt at siga, hví tað er so, men tað eru serliga tey ungu, sum "svíkja" fiskin.

Annechen Bugge sigur, at 22% av teimum spurdu siga seg eta fisk ella fiskamat tríggjar ferðir um vikuna - ella oftari.

– Hinvegin siga bert 10% av teimum, sum eru millum 15 og 24 ár, seg eta fisk ella fiskamat í sama mun sum fjøldin annars, sigur hon. **(-vilmund)**

# 14 fólk funnin á lívi

Út við 400 fólk blivu burtur í Java-havinum við bila-og ferðafólkaferjuni, Senopati Nusantara, tá hon sakk fyri 10 døgum síðan.

Sunnukvøldið vórðu 14 saknaði funnin aftur á lívi á einum bjargingarflaka – níggju samdøgur eftir skipsbrotið.

Tað var eitt farmaskip, sum kom fram á flakan og tey 14 fólkini. Flakin var rikin heilar 600 kilometrar burtur frá staðnum, har ferjan fórst.

15 fólk vóru á flakanum, men tann eini doyði beint eftir, at øll vóru fingin umborð á farmaskipið.

Tíðindastovan AP hevur hesi tíðindini frá bjargingarleiðsluni í Bali.

Tað var tann 29. desember, at ferjan sakk á veg úr Borneo til Java, og seinastu almennu tølini siga, at 628 fólk vóru umborð, tá ið vanlukkan hendi. Fleiri hundrað fólk vórðu stongd inni, tá ið ferjan sakk.

Áðrenn tey 14 vórðu funnin á lívi sunnudagin, eru skásett 220, sum eru sloppin frá skipsbrotinum við lívinum.

Seinasta mikudag funnu bjargingarfólk 12 onnur ferðafólk á lívi, og millum hesi var ein seks ára gamal drongur og pápi hansara.

Tað var illveður á leiðini, tá ið ferjan sakk. **(-vilmund)**